## "DRAGIN" á veg til Hetlands og Orkneyoyggjar

Gjáramorgunin fór skúlaskipið Dragin av Klaksvík við kós móti Hetlandi. Veðurmenninir siga fríkst lot av landnyrðingi og norðan, so skipið fær góðan byrð til Hetlands. Við átta míla ferð tekur tað umleið 24 tímar at sigla niður, so skipið skuldi komið leiðina fram hvørja løtu. Farið verður fyrst til Aith, sum liggur norðaliga á Mainlandi. Har skal ein galliónsfigurur setast undir spytið á Draganum. Hetta er ein gáva frá hetlendingum. Aftan á nakrar dagar í Hetlandi verður siglt til Kirkwall á orknoyggjum. Har verður vitjað í nakrar dagar. Túrurin hjá Daraganum í Hetlandi og Orknoyggjum tekur einar 8-10 dagar.



## Ov fá flash-kort



Risa-succes'in hjá iPhone og iPod hóttir nú marknaðin fyri flash minniskortum. Í verður fjórða hvørt minniskort, sum verður framleitt, selt til brúkarar av nýggju tónleikaspælarunum, og tað skapar fløskuhálsar á marknaðinum. Tó ikki fyri framleiðsluna hjá Apple, har tey hava gjørt langtíðaravtalu við fleiri veitarar. Hinvegin hevur tað givið trupulleikar hjá fleiri øðum mp3-framleiðarum, sum snøgt sagt hava verið noyddir at steðga framleiðsluni.

# Fakfelag átalar Gerhard Lognberg

**Búskapar- og løgfrøðingafelagið átalar, at Gerhard Lognberg skudlsetir og hóttir stjóran á Landsverki**

HÓTTAN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya átalar við hesum, at javnaðartingmaðurin úr Sandoynni í fjølmiðlunum skuldsetir og hóttir stjóran fyri Landsverk.

Tað sigur felagið í dag sum svar upp á greinina í Sosialinum í gjár.

Orsøkin til ákærurnar hjá Gerhardi Lognberg eru, at tilráðingar í einum innanhýsis tilmæli um sandoyartunnilin ikki samsvara við politisku áskoðanina hjá tingmanninum.

- Embætisfólk hava skyldu til at upplýsa eitthvørt mál til fulnar, soleiðis at politiski myndugleikin hevur fuldgott grundarlag at taka støðu á. Hetta merkir sostatt, at øll viðkomandi viðurskifti – búskaparlig, løgfrøðilig og samfelagslig - skulu lýsast og nágreinast, eisini tey, sum møguliga ikki eru í samsvari við ta ráðandi politisku áskoðanina, sigur felagið.



Nr. 140 - 24. juli 2007 Sosialurin TÍÐINDI 11

**Oyvindur Brimnes eigur at fáa sekkin**

**- Landsverk hevur provokerað sandoyingar so nógv, at Oyvindur Brimnes eigur at fáa sekkin í stundini, sigur Gerhard Lognberg, løgtingsmaður**

UNDIRSJÓVARTUNLAR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í Sosialinum í gjár kom fram, at Landsverk hevur gjørt eitt uppskot, har sagt verður, at um Skálafjarðartunnilin og Sandoyartunnilin verða lagdir í eitt og sama felag, so kann Sandoyartunnilin gerast uttan eina krónu úr landskassanum.

Men hetta hóvar ikki Gerhardi Lognberg, løgtingsmanni Javnaðarfloksins í Sandoynni og borgarstjóra í Skopun. Hann heldur, at løgtingið skal halda fast við tann leistin, sum nú er, har Skálafjarðartunnilin verður gjørdur av einum privatum felag, meðan Sandoyartunnilin verður gjørdur av tí almenna.

Landsverk heldur hinvegin, at eitt felag kann byggja báðar tunlarnar í senn við at leingja avdráttartíðina við tveimum árum – og uttan eina krónu úr landskassanum.

Gerhard Lognberg sigur, at hann ivast stórliga í hesum og heldur, at ætlanin hjá Oyvindi Brimnes og Landsverki er at forða verkætlanini við Sandoyartunlinum og at seta fólk upp í móti hvørjum øðrum.

- Hann eigur at fáa fimm minuttir og harvið sekkin, sigur Gerhard Lognberg, løgtingsmaður og borgarstjóri í Skopun.

Lesarabrævið hjá Gerhardi Lognberg kann lesast á síðu 13.

*- Landsverk er ímóti at verkætlanini við Sandoyartunlinum og Dalstunlinum – og tey royna at seta fólk upp í móti hvørjum øðrum, sigur Gerhard Lognberg*

Búskapar- og løgfrøðingafelagið leggur áherðslu á, at tað er sera umráðandi, at embætisfólk til eina og hvørja tíð kunnu røkja hesa skyldu uttan at verða útsett fyri grundaleysum skuldsetingum og hóttanum frá politiskari síðu.

Á blaðsíðu 12 í blaðnum í dag spyr Bill Justinussen, løgtingsmaður, um Oyvindur Brimnes er politikari. Løgtingsmaðurin sigur, at Landsverk skal veita landsstýrinum tøkniliga ráðgeving í sambandi við útbygging og viðlíkahald av undirstøðukervinum.

- Landsverk skal ikki verða politiskur ella fíggjarligur ráðgevi, sigur Bill Justinussen, sum staðfestir, at Landsverk er farið út um sínar heimlidir við uppritinum um at leggja Skálafjarðartunnilin og Sandoyartunnilin í eitt og sama felag soleiðis, at Sandoyartunnilin kann gerast uttan eina almenna krónur úr landskassanum.

Løgtingsmaðurin í Eysturoynni sigur, at neyðugt er at átala Oyvind Brimnes.

Búskapar- og løgfrøðingafelagið sigur hinvegin, at embætisfólk at skyldu at upplýsa mál til fulnar og vísir á týdningin av góðari embætisførslu.

# Edvard Heen stjórnarlimur í Tryggingarfelagnum Føroyar



**Edvard Heen verður nú stjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar.**

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Nevndin í Tryggingarfelagnum Føroyar P/F hevur sett Edvard Heen sum nýggjan lim í stjórn felagsins frá 1. august 2007.

Edvard Heen varð settur sum varastjóri í felagnum fyri einum ári síðani.

Stjórnin í í Tryggingarfelagnum Føroyar P/F sær sostatt soleiðis út frá 1. august 2007: Gunnar í Liða, forstjóri, og Edvard Heen, stjóri.